

# Martin Luther

## – miðaldarmunkurin og moderniteturin



*Hans Andrias Sølvará,*
*søgufrøðingur*

Arvurin eftir tann katólska munkin úr Wittenberg, Martin Luther (1483 -1546), kom at fáa stóran týdning fyri evropeiska søgu, átrúna og samfelagsmenning. Kirkjur í Norðurevropa játta seg beinleiðis til ta kristnu læruna hjá Martini Luther frá 1530, men tað eru rættiliga ymisk skotsmál, sum eftirtíðin hevur givið honum. Meðan tann kendi protestantiski týski gudfrøðingurin Adolf von Harnack (1851-1930) stutt áðrenn stóru ræðuleikarnar undir nasismuni skrivaði, at tann nýggjara tíðin byrjaði við reformatiónini hjá Martini Luther, „hamarsløgini á hurðina til slotskirkjuna í Wittenberg innleiddu hana", so hevur enski søgufrøðingurin A. J. P. Taylar (1906-1990), sum skrivaði í 1945, hildið, at alt fór av lagi í Týsklandi við Martini Luther. Í hesi grein verður roynt at fara aftur til tíðina, sum Martin Luther livdi í, hugt verður eftir søguligu fortreytunum undir virki hansara, og við støði í hesum verður mett um týdningin, hann hevur havt fyri tað modernaða Evropa.

### Tað katólska kristna Evropa verður til og hótt

Politiski miðdepilin í Evropa hevði, tá ið miðøldin fór at halla um 1500, verið í Suðurevropa. Tað var har, at Rómverjaríkið – „allur heimurin" sambært Lukasevangeliinum (2:1) – vaks fram í øldunum fyri Kristi føðing og gjørdi Miðalhavið til ein rómverskan innsjógv. Tað var í hesum máttmikla heimsveldi, at kristindómurin vaks fram og mentist til ein heimsátrúna við Róm sum bæði átrúnaðarligum og politiskum miðdepli. Tann slóðbrótandi hendingin var, tá ið Konstantin tann Stóri, sum tann fyrsti rómverski keisarin, í 312 e.Kr. tók við kristnari trúgv. Í 390 gjørdi Theodosius kristindómin til einastu loyvdu trúgv í Rómverjaríkinum. Samstundis datt ríkið sundur í eitt eysturrómverskt ríki við Konstantinopel sum høvuðsstaði og eitt vesturrómverskt ríki við Róm sum høvuðsstaði. Tað hevði við sær, at kirkjan fór í tvíningar við patriarkinum í Konstantinopel sum leiðara eystanfyri, meðan pávin í Róm, sum framvegis helt seg vera einasta rætta umboð Guðs á jørð, gjørdist leiðari fyri katólsku kirkjuna vestanfyri. Í tí politiska tómrúminum, sum stóð eftir vestanfyri, tá ið vesturrómverska ríkið fall í 473, stóð katólska kirkjan í nógv størri mun enn patriarkurin í Konstantinopel í eysturrómverska ríkinum, sum politiskt yvirlivdi til 1453, tá ið eysturrómverska ríkið eisini fall, eftir sum ein valdstáttur, ið eisini politiskt sæð kundi taka yvir. Og tað gjørdi katólska kirkjan – onkuntíð við óreiðiligum amboðum. Kendu orð Jesusar sambært Markusevangeliinum (12:17): „Gevið keisaranum tað, ið keisarans er, og Guði tað, ið Guðs er", vóru ikki skilt soleiðis, sum tey vanliga verða skilt í dag. Eitt aðaleyðkenni fyri ta kristnu evropeisku miðøldina (500-1500) var drúgt stríð millum ta universellu katólsku kirkjuna og tey nógvu ríkisvøldini, sum vuksu fram og styrktust gjøgnum miðøld-

ina, um rættin til bæði trúarliga og politiska valdið.

Sambært belgiska søgufrøðinginum Henri Pirenne vóru tað ikki teir heidnu germansku ættarbólkarnir, sum oyðiløgdu vesturrómverska ríkið, tí rómverjar vóru ikki 'germaniseraðir', men heldur vóru tað germanarnir, ið blivu 'romaniseraðir'. Soleiðis breiddi kristindómurin seg við teirri katólsku kirkjuni, sum helt seg hava einkarætt til at umboða Guðs myndugleika á jørð, eisini norðureftir. Tað var hinvegin muslimska útbreiðslan í Miðeystri, Norðurafrika og Spania í 600-700-talinum, sum fyri fyrstu ferð fekk valdið í Evropa at kvinkast norðureftir, men tað, sum avgerandi var við til at forskjóta búskaparliga og politiska valdið í Evropa frá Miðalhavinum og norður móti Atlantshavinum, var turkiska hertøkan av Konstantinopel í 1453. Forðingar og dýrkandi millumhandlarar á handilsleiðunum úr Miðalhavinum og eystureftir vóru treytir fyri, at farið varð undir at leita eftir nýggjum handilsleiðum eystureftir. Hetta varð ein høvuðsgrund til, at spaniólar í 1492 sendu Kristoffur Kolumbus yvir Atlantshavið fyri at finna farleiðina til India, og at portugisar í 1497-98 sendu Vasco Da Gama eystur um Afrika fyri at finna aðra siglingarleið eystureftir. Sum frá leið hevði hetta við sær, at búskaparliga og politiska valdið í Evropa flutti frá Miðalhavinum og til londini við Atlantshavið.

Rannsóknarferðirnar í 1400- og 1500-talinum høvdu eisini við sær, at tann miðaldarliga heimsmyndin, sum katólska kirkjan hevði bygt sín



gudfrøðiliga grundvøll á, syndraðist – vísindaliga, mentanarliga og politiskt.

## Miðaldarkirkjan

Sum arvtakari fyri vesturrómverska ríkið vaks fram „Tað Heilaga Týsk-rómverska Keisararíkið av týskari tjóð“ frá 900-talinum – eitt ríki, sum var karmurin rundan um virksemið hjá Martini Luther í 1500-talinum. Hetta ríkið skilti seg eins og navnið ber boð um sum arvtakari av vesturrómverska ríkinum – tey trý orðini „av týskari tjóð“ komu ikki í navnið fyrr enn í 1400 talinum – og var politiska valdið undir katólsku kirkjuni.

Krossferðirnar í 1100-1200-talinum, svartideyði í 1340-árunum og muslimska hóttanin – turkarnir stóðu við múrarnar í Wien í 1529 – skapti sterka undirtøku fyri kristindóminum, men svartideyði skapti eisini iva kring leiklutin hjá katólsku kirkjuni sum Guðs umboð á jørð. Í fyrra lagi hjálptu vegleiðingar frá katólsku kirkjuni einki, og í øðrum lagi fingu nógv, sum vóru so heppin at yvirliva, samvitskubit av at hava yvirlivað og leitaðu tí inn í seg sjálvi eftir eini meira innarligari og einstaklingavendari gudstrúgv. Hetta peikaði alt móti reformatiónini.

Hartil kom, at katólska kirkjan, sum hevði bókligan og eisini verkligan einkarætt til at útleggja kristindómin, hevði misnýtt sína sterku støðu mótvegis tí illiterera meirilutanum. Katólska kirkjan hevði í samsvari við ta stigskipaðu (hierarkisku) feudalu miðaldarhugsanina ment eina gudfrøði, har tað var kirkjuliga úrvalsliðið undir leiðslu av einum lýtaleysum páva, sum hevði størri 'andaligan kapital' enn vanliga fólkið, ið skuldi taka sær av viðurskiftunum hjá vanliga fólkinum við Guð. Gudfrøðiliga merkti hetta, at katólska kirkjan skilti seg sum eitt neyðugt millumlið millum Guð og vanlig menniskju, sum heldur ikki skiltu latín, bíbilska málið hjá katólsku kirkjuni. Latínska loysunarorðið var „extra ecclesiam, nulla salis“, t.e. uttan fyri kirkjuna, eingin frelsa. Hetta merkti eisini, at størri krøv vóru sett til kirkjuliga úrvalsliðið enn til vanliga fólkið, sum tó við góðum gerningum kundi fáa lut í andaliga kapitalinum hjá katólsku kirkjuni. Eitt nú høvdu prestar ikki loyvi til at gifta seg og fáa familju og børn, teir skuldu halga alt sítt lív til kirkjuna og Gud. Hetta menti seg sum frá leið til eina skipan, har leikfólk beinleiðis kundu keypa sær lut í andaliga kapitalinum – m.a. syndafyrigeving – hjá kirkjuni, tey sokallaðu avlátsbrøvini. Tað vóru longu seint í miðøldini fleiri, sum settu spurnartekn við hesa skipanina við avlátsbrøvum, men tað vóru nógv fleiri, sum settu spurnartekn við nýtsluna av teimum.

Katólska kirkjan brúkti ikki altíð reiðilig amboð fyri at verja sína máttmiklu samfelagsligu støðu. M.a. brúkti hon tað sokallaða konstantinska gávubrævið, sum staðfesti, at fyrsti kristni rómverski keisarin, Konstantin tann Stóri, umleið 330 skuldi havt latið valdið upp í hendurnar á kirkjuni, men í 1400-talinum avdúkaði skjalagranskarin Lorenzo Valla, at konstantinska gávubrævið var eitt falsum, sum helst varð framleitt á einum kirkjufundi í 750-800 – fleiri hundrað ár eftir deyða Konstantins

## Reformatiónin í sínum margfeldni

Reformatiónin førdi við sær, at trúargreinirnar øktust í tali. Tær flestu bygdu á læruna hjá Lutheri um Bíbliuna sum tað einasta sanna trúargrundarlagið og frelsuna sum Guðs gávu til menniskjað. Men nakrir smámunir vóru eisini:

**LUTHERANARAR** mettu Bíbliuna vera Guðs sanna orð. Trúgvin eina kann bjarga menniskjanum, av tí at Jesus longu hevur tikið revsingina fyri syndirnar hjá menniskjunum á seg við krossfestingini. Luther varðveitti nakrar av siðunum hjá katolikkunum, eitt nú barnadópin.

**CALVINISTAR** mettu, at rásin til frelsu ikki gongur gjøgnum trúgv eina, tí Guð hevur longu undir skapanini valt tey út, sum eru ætlað at verða frelst. Hin einstaki eigur tó at fylgja Bíbliuni og verða vegleiddur av kirkjuni.

**ANABAPTISTAR** hildu, at børn ikki eru før fyri at taka støðu til trúarspurningar. Tí eiga bert vaksin at verða doypt. Teirra fatan er eisini, at tey kristnu hava skyldu til at skapa eitt rættvísari samfelag.

**ANGLIKANARAR** bygdu ikki bert á Bíbliuna, men valdu eisini eins og katolikkar at taka siðvenjur og tulkingar við inn í teirra trúarfatan. Anglikanska kirkjan hevur eitt meira siðbundið og fast hierarki enn onnur protestantisk trúarsamfeløg.

**FILIPPISTAR** lósu Bíbliuna frá einum rationellum sjónarhorni og mettu, at Guð hevur givið menniskjum evnini at velja rætt. Tey hildu eisini, at góðar gerðir kunnu hjálpa frelsuni fram á leið.



– fyri at rættvísgera myndugleika kirkjunnar. Eisini brúkti katólska kirkjan avlátsbrøv til at fíggja stórar byggiverkætlanir í Róm. Samstundis var valdsstríð millum tey styrknaðu ríkisvøldini í seinmiðøldini um leiðsluna av kirkjuni. Ta einu tíðina fyrst í 1300-talinum fekk franski kongurin fyriskipað tað soleiðis, at pávin búði í suðurfranska býnum Avignion. Fyri at fáa endurgjald fyri mistar inntøkur frá ognunum í Róm víðkaði pávin munandi um avlátshandilin. Tá ið pávin aftur flutti til Róm í 1337, valdu fronsku kardinalarnir ein annan páva í Avignion, soleiðis at tað nú vóru tveir pávar. Handilin við avlátsbrøvum broyttist eisini so grundleggjandi, at tað enntá var møguligt at keypa deyðum pláss í himmiríki. Tey, sum áttu avlátsbrøvini, fingu beinleiðis prógv fyri, at tey fingu frelsuna í býti.

## Martin Luther, katólska kirkjan og reformatiónin

Tað var í hesum kirkjuliga umhvørvinum í Evropa, har vanlig fólk vóru farin at missa álitið á kirkjuna, sum mest av øllum tóktist røkja síni egnu verðsligu áhugamál, at katólski munkurin Martin Luther vaks til mans í týsk-rómverska keisararíkinum. Hann vaks upp í eini katólskari familju, sum ikki hoyrdi til ovasta stigið í kirkjuliga hierarkinum og var tí vanur við, at ávísar atfinningar kundu setast fram móti kirkjuni. Tá ið hann í 1517 negldi tær heimskendu 95 tesurnar á hurðina í kirkjuni í Wittenberg, so var tað serliga fyri at fáa kjak í lag innan kirkjuna um serliga avlátsbrøvini, sum hann ikki helt, at kirkjan hevði heimild til at útskriva. Fyri Martin Luther var tað serliga trúgvin, sum frelsti eitt menniskja, og tað var bert gjøgnum egna samvitsku, – hvørki umvegis góðar gerðir í sjálvum sær ella kirkjuliga úrvalsliðið – at tann einstaki røkti síni viðurskifti við Guð. Hinvegin hevði hann ongar ætlanir um at slíta við katólsku kirkjuna, men kjak fekk hann ikki. Svarið frá kirkjuni var, at hann skuldi taka tesurnar aftur, men tað vildi hann ikki. Í 1520 varð hann við pávarullu lýstur í bann, t.e. útihýstur úr tí kirkju, sum segði seg vera einasta veg til frelsu. Á ríkisfundinum í Worms, sum týsk-rómverski keisarin Karl V hevði kallað inn til í 1521, stóð Martin Luther við tesurnar og segði sambært protestantiskari siðvenju tey kendu orðini: „Her standi eg, eg kann ikki annað, Guð hjálpi mær, amen". Nú vendist ikki aftur, og tað slapst ikki longur undan einum veruligum broti við katólsku kirkjuna. Tað hevði við sær, at hann var dømdur trúarvillingur og friðleysur og var tí í stórum vanda fyri at verða brendur á báli.

> Harvið styrktust týsku fúrstarnir enn meira mótvegis katólsku kirkjuni og keisaranum. Fúrstar og kongar brúktu eisini høvi til eftir deyða Martin Luthers at fáa størri vald enn ætlað á kirkjurnar

> Líka so greitt er tað, at Martin Luther, sum helt, at Sátans verk lá undir gerðum hjá muslimum, jødum og katolikkum, virkaði í eini tíð, ið er okkum fullkomiliga fremmand

Fyri at bjarga Martini Luther undan vandanum fyri at verða brendur á báli, syrgdi Fríðrikur tann Vísi, fúrsti av Saksen, fyri, at hann varð tikin og hildin í sjálvbodnum varðhaldi á borg síni í Wartburg. Katólska kirkjan kravdi at fáa Martin Luther útflýggjaðan, men tað sýtti Fríðrikur tann Vísi fyri at gera. Umdømi hjá Martini Luther øktist bara av hesum. Meðan Martin Luther var í sjálvbodnum varðhaldi, týddi hann Bíbliuna til týskt, soleiðis at eisini vanlig fólk kundu lesa hana. Tað var eisini í samsvari við læru hansara, at skriftirnar einans, „solo scriptura", skuldu vera grundstøði undir kristnu trúnni, og at uppgávan hjá prestum bert var at útleggja skriftina fyri teimum kristnu, sum einans kundu frelsast við trúgv. Samstundis varð tann nýggja prentlistin hegnisliga nýtt av viðhaldsfólkum til at breiða læru hansara út. Martin Luther var í sjálvbodnum varðhaldi hjá Fríðriki tí Vísa til 1522, tá ið ófriður var um at taka seg upp millum týsku bøndurnar, sum hann við sínum góða umdømi skuldi royna at byrgja fyri fór at breiða seg. Týsku bøndurnir, sum við støði í læruni hjá Martini Luther um, at øll menniskju vóru líka, gjørdu uppreistur móti týsku fúrstunum og teirra feudalu (hierarkisku) samfelagsskipanum, lótu seg tó ikki sissa. Í 1525 kom tað til veruligan bóndauppreistur, og Martin Luther, sum var undir verju av fúrstanum í Saksen, avgjørdi at stuðla týsku fúrstunum í at niðurberja uppreisturin. Øll menniskju vóru líka mótvegis Guði, men hetta var eftir øllum at døma ikki galdandi fyri samfelagið, sum varðveitti ta feudalu hierarkisku skipanina, ið Martin Luther hevði sett seg upp ímóti í sambandi við kirkjuna.

Í politiskum høpi vísti Martin Luther seg kortini at hava gjørt eitt klókt val, tá ið hann her hevði sameint seg við teir sterku norðurtýsku fúrstarnar, tí uttan teir hevði hansara læra neyvan vunnið frama; men hann vágaði harvið eisini, at hansara kirkjur, sum skuldu vera undir leiðslu av prestunum, komu undir størri ávirkan frá fúrstunum, ið brúktu læru Martin Luthers um, at kirkjan ikki skuldi eiga nakrar ognir, til at leggja ognirnar hjá kirkjuni undir seg. Harvið styrktust týsku fúrstarnir enn meira mótvegis katólsku kirkjuni og keisaranum. Fúrstar og kongar brúktu eisini høvi til eftir deyða Martin Luthers at fáa størri vald enn ætlað á kirkjurnar.

Ein fortreyt fyri eydnuni hjá Martini Luther var eisini, at hann – eins og við profetiskum menskum – var heilt sannførdur um, at hann hevði sannleikan á sínari síðu. Hvørki mótvegis muslimum, katolikkum ella jødum legði hann nakrantíð upp til kjak. Hann sá tað hinvegin sum sína uppgávu at umvenda jødarnar til lutherska kristindómin. Tá ið tað ikki eydnaðist honum, kastaði hann á gamalsaldrinum hatur á teir. Í 1543 skrivaði hann m.a. eitt rit, „Jødarnir og lygnir teirra", har hann m.a. heitti á kristin um at brenna sýnagogurnar – ja, um neyðugt skuldi fúrstin eins og í Spania útvísa jødarnar úr Saksen. Tað er ikki prógvað, at Martin Luther hevði ein fingur við í spælinum, men tá ið jødarnir eisini vórðu útvístir úr Saksen, hevði Martin Luther nakrar fáar dagar frammanundan verið á vitjan hjá Fríðriki tí Vísa, har hann hevði havt eina samrøðu

við hann, og aðrir fúrstar settu strangar fyriskipanir í verk mótvegis jødunum orsakað av sjónarmiðunum hjá Martini Luther.

Hóast antisemitisma var ein óhugnaligur partur av kristnari evropeiskari mentan langt undan Martini Luther, – í miðøldini fingu jødarnir skyldina fyri eitt nú útbreiðsluna av svartadeyða – so ber ikki til at fríkenna hann fyri at eiga sín part av eitranini av evropeiskum hugsunarhátti um jødar í 19. og 20. øld. Myndugleikin, sum Martin Luther hevði, gjørdi, at fleiri lutherskir leiðarar tóku undir við honum, men tað vóru eisini kristin í samtíð hansara, sum tóku frástøðu frá hansara hugsanum um jødar. Hinvegin er tað neyðugt at gera vart við, at hansara átrúnaðarliga grundaða jødahatur ikki miðaði móti at týna jødarnar, soleiðis sum nasistarnir, grundað á ástøði um rasu og blóð, settu sær fyri í 20. øld. Líka so greitt er tað, at Martin Luther, sum helt, at Sátans verk lá undir gerðum hjá muslimum, jødum og katolikkum, virkaði í eini tíð, ið er okkum fullkomilig fremmand. Týski søguprofessarin Heinz Schilling hevur sagt: „Luther hugsaði og virkaði sum eitt „menniskja millum Guð og Djevulin“, og soleiðis eiga vit at gera hann skilligan fyri eini nútíð, sum ikki longur kennir Djevulin og bert Guð – um yvirhøvur – í gudsmyndum, sum høvdu verið óskiljandi fyri wittenbergaran.“

Sum við so nógvum øðrum hjá Martini Luther, so hevur hann havt nógva ávirkan, sum ikki var tilætlað.

## Týdningur Martin Luthers

Eftirtíðin hevur sum nevnt mett týdningin av Martini Luther rættiliga ymiskt, men tað er ein sannroynd, at hann fekk stóran týdning og hevur verið mettur at hava havt stóran týdning fyri menningina av tí verðsligu ríkisskipan við átrúnaðarligum tolsemi, sum var knæsett og mentist við støði í friðinum í Westfalen í 1648, eftir at drúgv religiónskríggj høvdu herjað í Evropa. Eftir friðin í Westfalen – og við støði í læruni hjá Martini Luther um ein skilnað millum átrúnaðarligt og verðsligt vald – mentist ein ríkisskipan, ið sum frá leið loysti ríkisleiðarar frá byrðini av altíð at verja universellar kirkjuligar lærusetningar. Tað ber kortini ikki til at síggja burtur frá, at tað eisini vóru lítið tolsamar átrúnaðarligar kreftir, sum reformatiónstíðin hevði slept leysar, ið gjørdu tað neyðugt í 1648 at menna eina statsskipan við størri átrúnaðarligum tolsemi. Harumframt breyt reformatiónin einkarættin og einkavaldið hjá katólsku kirkjuni í trúarspurningum og kom tí eisini í longdini at stuðla undir trúarligt tolsemi í Evropa. Eisini katólska kirkjan varð noydd til at endurnýggja seg orsakað av avbjóðingini frá Martini Luther – tað hendi á tveimum kirkjufundum í Trident í 1547-62. Rættiliga avgerandi var tað eisini, at við reformatiónini kom átrúnaðurin at hava ein leiklut í dagliga lívinum hjá vanligum fólki, sum í nógv størri mun enn áður eisini fingu ábyrgdina av at liva sítt lív í samsvari við kristnu læruna, meðan tað í katólsku miðaldarskipanini nærum bert hevði verið nakað, ið kirkjuliga úrvalsliðið hevði ábyrgdina av.

Avgerandi í hesum sambandi var, at bíbilska málið fór frá latíni til tey fólksligu (nationalu) málini. Í Føroyum kom tað hinvegin at vera danskt ríkisvald og danskt mál, sum styrktist við reformatiónini umleið 1540, og tað tók 400 ár, til kirkjumálið í 1939 gjørdist føroyskt og eina góða hálva øld afturat til kirkjan gjørdust føroysk.

Reformatiónin fekk við øðrum orðum stóran týdning fyri menningina fram móti tí verðsliga, fjølbroytta og tolsinta samfelagnum, sum er kent vestanfyri í dag, men tað hevur hinvegin verið peikað á, at nógvar av teimum broytingum, sum hendu aftan á Martin Luther, eisini høvdu aðrar orsøkir og enntá vóru ótilætlaðar og ikki í samsvari við ætlanir hansara. Tá ið tosað verður um reformatiónina, so er vert at leggja til merkis, at Martin Luther hvørki var tann fyrsti (onglendingurin John Wycliffe (1330-1384) og kekkin Jan Hus (1370-1415), sum varð dømdur at vera trúarvillingur og brendur á báli í 1415, settu fram líknandi hugsanir og atfinningar móti katólsku kirkjuni) ella einasti reformatorurin, sum legði áherðslu á frelsu gjøgnum trúgv eina; og at røturnar til kritikk og upployssn av katólsku kirkjuni tí kunnu førast langt aftur í miðøldina; men Martin Luther var tann reformatorurin, sum fekk størst ávirkan; og tað var ikki fyrr enn í 1500-talinum, tá ið ríkis- og fúrstavald var nógv styrkt í mun til katólsku kirkjuna, at tílíkar hugsanir reint valdspolitiskt høvdu møguleika fyri at vinna frama. Tí er rættari at tosa um fleiri reformatiónir (tann anglekanska í Onglandi og tær á evropeiska meginlandinum hjá sveisaranum Hulrych Zvingli (1484-1531) og fraklendinginum Jean Calvin (1509-1564)), sum fevndu yvir eitt rættiliga langt reformatiónstíðarskeið. Samstundis er tað eisini greitt, at Martin Luther ikki ætlaði at gera upp við kristnu universalismuna, sum katólska kirkjan bygdi á, tí Martin Luther var eisini sannførdur um, at hansara kristna læra var tann einasta rætta fyri alt Evropa, ja, fyri allan heimin; men ein ótilætlað avleiðing av m.a. hansara virksemi var, at bæði katólska kirkjan og protestantisku ríkiskirkjurnar gjørdust til serstakar kirkjur, sum ikki longur kundu gera krav uppá at umboða allan tann kristna heimin.

Tað er í hesum universalistiska kristna høpi, at vit skulu síggja ótolsemið mótvegis trúarligum mótstøðufólkum, sum vit síggja í nógvum skriftum hjá Martini Luther, m.a. sannføringina hjá honum um, at jødarnir noyddust at taka við lutherskari kristnari trúgv – annars kundu teir í ringasta føri verða útvístir úr Saksen. Tí var tað heldur ikki í samsvari við hugsanir Martin Luthers, at samvitskufrælsið í Evropa skuldi mennast til at gerast ein almenn verðslig meginregla, sum skuldi vera galdandi fyri øll menniskju, tí hansara samvitskufrælsi var avmarkað og hevði hansara protestantisku læru sum universella fyritreyt. Sambært Martini Luther var tað uppgávan hjá myndugleikunum at syrgja fyri, at øll menniskju beint eftir føðing vóru doypt og upptikin í ta luthersku kirkjuna. Tað skuldi – eins og gudloysi – vera revsivert at seta seg upp ímóti barnadópinum ella tríeindarlæruni. Samvitskufrælsið hjá Martini Luther hevði tí lítið við modernað verðsligt samvitskufrælsi at gera, men læran hjá Martini Luther um eitt – væl at merkja luthersk treytað – samvitskufrælsi hjá tí einstaka kristna, sum eisini hevði røtur í renessansuni, slóðaði kortini fyri verðsliga evropeiska samvitskufrælsinum.

## Endaorð

Í størri høpi kunnu vit tulka alla reformatiónstíðina sum part av forskjótingini av tí politiska og búskaparliga valdinum í Evropa frá miðalhavsøkinum móti atlantshavsøkinum, sum hendi í tíðarskeiðinum av øðrum grundum, men miðaldarmunkurin úr Wittenberg, sum dugdi at síggja, hvønn veg valdið flutti seg, fann sær røttu valdsharrarnar at sameina seg við. Martin Luther fekk tí stóran týdning fyri tað nýggja Evropa, sum í longdini kom burtur úr hesi stóru byltingartíð, men sjálvur hevði hann óivað sæð tað modernaða tolsemið, fjølbroytni og ta verðsliggering, ið lutvíst var eitt úrslit av hansara egna lívsverki, sum ein sigur fyri djevulin.

## Bókmentir

Duffy, Eamon: Saints and Sinners. A History of the Popes. Yale University Press, London, 2014.

Gregory, Brad S: The Unintended Reformation. How a Religious Revolution Secularized the Society. Harvard University Pres, London, 2012.

Lausten, Martin Schvarz: Martin Luther – munk – oprører – reformator. Alfa, København, 2005.

Lausten, Martin Schvarz: Kirkens historie i Danmark. Pavekirke – Kongekirke – Folkekirke. Forlaget, Århus, 2008.

Mørch, Søren: Det Europæiske Hus. Civilisationen. København, Gyldendal, 1991.

Pirenne, Henri: Mohammed and Charlemagne. Dover Publications, New York, 2001.

Schilling, Heinz: Martin Luther. Rebel i en opbrudstid. Kristeligt Dagblads Forlag, København, 2014.

Sproul, R. C. og Nichols, Stephen J. (ritstj.): The Legacy of Luther. Reformation and Trust Publishing, Orlando, 2016.

Taylor, A. J. P.: The Course of German History. Routledge, London, 2001.